# Blaðmannayrkið – eitt spennandi og fjølbroytt yrki

*Heini Niclasen av Eiði hevur verið í praktikk á Sosialinum, har hann hevur upplivað mangt og hvat og skrivað fleiri greinar í blaðið*




**Heini Niclasen av Eiði hevur seinastu 14 dagarnar verið í starvsvenjing á Sosialinum**

STARVSVENJING
*Eirikur Lindenskov*

– Mær hevur dámað væl at verið í starvsvenjing á Sosialinum, sigur Heini Niclasen av Eiði, sum gongur í 9. flokki á Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

– Eg havi verið við til fleir stórar hendingar, sigur Heini, og nevnir hann millum annað vitjanina hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra og stóra narkomálið, sum var fyri í rættinum í síðstu viku.

Heini var við á tíðindafundinum í Tinganesi, og tók hann myndir av forsætisráðharranum. Hann var eisini saman við blaðmonnum og myndamonnum frá Sosialinum, sum fylgdu við avhoyringunum í Føroya Rætti í sambandi við, at fleiri mans vórðu tiknir fyri narkotikasmugling.

Á Sosialinum hevur hann upplivað, hvussu eitt blað verður til, og hvussu arbeitt verður við tíðindum á internetinum, bæði við Internet Sosialinum og á Portalinum hjá Føroya Tele, har Sosialurin skrivar tíðindini – har Heini eisini hevur skrivað onkra søguna.

– Hetta var av fínasta slag, sigur Heini, sum heldur, at tað hevði verið spennandi seinni at roynt seg í tíðindaheiminum.

# Jógvan og Dan á Norðurlandaráðsfundi í Oslo

**Í hesum døgum hevur Norðurlandaráðið fund í norska høvuðsstaðnum, Oslo**

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Eirikur Lindenskov*

Føroysku umboðini í Norðurlandaráðnum, Jógvan við Keldu og Dan Reinert Petersen, gava verið á Norðurlandaráðsfundinum, sum hevur verið hildin í Oslo seinastu dagarnar.

Fundurin er sermektur av, at tað er fyrsti fundur eftir nýggja bygnaðinum hjá Norðurlandaráðnum.

Norðurlandaráðið hevur áður verið skipað við trimum nevndum umframt formansskapinum Norðurnevndini, Nærøkisnevndini og Europanevndini.

skipað soleiðis, at hesar nevndirnar nú í størri mun líkjast teimum nevndum, ið eru í teim ymsu tingunum í norðurlondum. Nevndirnar eru:

Mentanar- og útbúgvingarnevndin
Trivnaðarnevndin
Medborgara- og brúkaranevndin
Umhvørvis- og náttúrutilfeingisnevndin
Vinnunevndin



*Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum og Dan R. Petersen úr Javnaðarflokkinum eru føroysku umboðini í Norðurlandaráðnum*

Hvør nevndin er mannað við 15 limum. Føroyar eru umboðaðar í Mentanar- og útbúgvingarnevndini, har Jógvan við Keldu situr, og í Umhvørvis- og náttúrutilfeingisnevndini, har Dan Reinert Petersen, situr.

Eitt av teimum málum, sum verður viðgjørt í Mentanar- og útbúgvingarnevndini er uppskotið hjá »mittergruppen«, »Et handslag til vestnorden«.

»Mittergruppen« skjýtur upp, at Norðurlandaráðið tilmælir til Norðurlendska Ráðharraráðið um at gera útnorður meira sjónligt bæði innan norðurlond og í Europa.

# Kvøldseta í Leirvík

KVØLDSETA
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, týskvøldið, kl 19:30 verður kvøldseta í bygdarhúsinum í Leirvím Á skránni verður felagssangur, Ólavur Heinesen greiðir frá einum drúgvum útróðrartúi, Osmund Justinussen hugleiðir um barna- og ungdómsár í Leirvík. Upplestur við Hákun Andrasen.

Hans Arni Jensen, sum eina tíð hevur verið kristniboðari í Ný Guinea, hugleiðir og greiðir frá upplivingum har. Hann vísir eisini ein stuttan film.

Óla Jákup og Ingun Joensen framføra tónleik, og Símun Skorastein lesur egnar yrkingar.

Kaffi og te og smákøkur verða at fáa

Tíðindaskriv frá MÁF:

# Stórur útisjónleikur á Ólavsøku

Komandi vikuskiftið verður sjónleikarastevna í Nólsoy. Tema á stevnuni er »Útisjónleikur í summar«, og er ætlanin, at úti í Nólsoy verða lunnarnir lagdir undir útisjónleikinum, ið verður leiktur á Ólavsøku.

Jenny Petersen og Egi Dam frá Leikhúsinum Grímu fara at tosa um útisjónleik í Føroyum og í Noregi. Videobrot úr útisjónleikinum í Havn í ’91 verða víst.

Workshop verður í rødd, rørslu og improvisatión. Hesum taka sjónleikararnir Birita Mohr, Páll Danielsen, Egi Dam og Kristina Hansen sær av.

Birita Krossteig og Rúna Mortensen úr Havnar Sjónleikarfelag hava sminkuskeið, og fólk kunnu í sambandi við veitsluna, sum verður leygarkvøldið 2. februar kl. 19.30, verða sminkað ella fáa vegleiðing til tess.

Rundferð verður í Nólsoyar bygd, har formaður MÁF’s, Hilmar Joensen, verður frásøgumaður.

Á stevnuni verður sjónleikurin »Fótur í hosu« hjá Grímu leiktur bæði fríggjakvøldið 1. februar kl. 20.30 og sunnudagin 3. februar kl. 15.00.

Pláss er enn fyri teimum, ið tekna seg til stevnuna í Nólsoy, tí freistin at tekna seg er longd til mánadagin 28. januar.

Í nevndini í MÁF eru: Hilmar Joensen, formaður, Birita Krossteig, næstformaður, Jógvan Ravnsfjall, kassameistari, Heiðrun Hansen og Svend Højgaard. Tiltakslimir eru Hjørdis Johansen og Axel Joensen.

Listarligi ráðgevi MÁF’s er Birita Mohr, meðan Mallan Matras Joensen er dagligur leiðari.



*Frá útisjónleikinum hjá Grímu á ólavsøku 1991*



# Fyribyrgingarráðið fylgir við



*- Persónliga kundi eg hugsað mær, at ávirkanin á børnini í skúlunum gjørdist eitt natúrligt lið í dagligu undirvísingini, soleiðis at tey læra um ymsar vandar líka natúrligt sum um støddfrøði og landalæru, sigur Heðin Thomsen, formaður í Fyribyrgingarráðnum*

**- Vit fylgja avgjørt við, hvat hendir, hava samband við løgregluna og hoyra, hvat er frammi í fjølmiðlunum. Spurningurin er altíð, um nóg nógv fyribyrgingararbeiði verður gjørt. Vit kunnu altíð gera meir, men vit eru noydd at raðfesta orkuna, vit hava til alt fyribyrgingar-arbeiðið, sigur Heðin Thomsen, formaður í Fyribyrgingarráðnum**

FYRIBYRGING
*Turið Kjølbro*

Formaðurin í Fyribyrgingarráðnum skilir ikki rættiliga atfinningarnar hjá Ernu S. Hákonardóttir, alkohol- og familjuráðgeva. Hon setti í Sosialinum seinasta fríggjadag spurnartekin við leiklutin hjá Fyribyrgingarráðnum, nú tað í seinastuni er komið fram, at rúsevnisnýtslan millum ung í Føroyum er so nógv vaksin. Hon segði millum annað, at út frá hagtølum, sum eiga at vera til um misnýtsluna sum er, eiga myndugleikarnir og eitt nú Fyribyrgingarráðið at seta í verk tiltøk og fyribyrgingararbeiði eins og tað verður gjørt í øðrum londum.

- Fylgir Fyribyrgingarráðið ikki við, hvat hendir í samfelagnum, veit eg ikki, hvat tað skal brúkast til. Hóast alt kókar um rúsevnismisnýtslu og annað misbrúk, letur Fyribyrgingarráðið ikki við seg koma, segði Erna S. Hákonardóttir, sum hevur nógvar royndir sum alkohol- og familjuráðgevi í Føroyum.

- Um tað kanska ikki er so sjónligt fyri almenningin, ger Fyribyrgingarráðið eitt stórt arbeiði á nógvum ymiskum økjum, sigur Heðin Thomsen, formaður í Fyribyrgingarráðnum.

- Vit taka so avgjørt ábendingarnar í álvara, men um rúsevnisnýtslan er nógv vaksin, veit eg ikki at siga. Vit fara at viðgera málið á komandi fundi í ráðnum, sigur Heðin Thomsen.

## Atgongd til alla upplýsing

Arbeiðið, sum Rúsdrekka- og Narkotikaráðið gjørdi, førir Fyribyrgingarráðið, sum tók við 1. jan. í ár, víðari. Ætlanin er, at Fyribyrgingarráðið skal hava konsulentar knýttar at sær. Konsulentar skulu vera fólk, sum arbeiða innan ymsa viðgerð í Føroyum. Hesi skulu ráðgeva Fyribyrgingarráðnum, greiða frá, hvussu støðan er innan misnýtslu og annað, og gera tilmæli um, hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk.

-Hvussu fyribyrgingararbeiðið skal gerast og hvar hetta skal gerast, er eingin ivi í. Heilsusystrarnar gera eitt stórt arbeiði úti á skúlunum, og vit fara eins og Rúsdrekka- og Narkotikaráðið at skipa fyri ymsum tiltøkum. Hetta kann eitt nú vera, at fólk eftir áheitan frá skúlum undirvísa næmingum. Eisini skal uppsøkjandi arbeiði gerast.

Fyribyrgingarráðið hevur atgongd til allar upplýsingar og hagtøl, sum eru um misnýtslu av ymsum evnum.

- Vit fylgja avgjørt við, hava samband við løgregluna og hoyra, hvat er frammi í fjølmiðlunum. Spurningurin er altíð, um nóg nógv fyribyrgingararbeiði verður gjørt. Vit kunnu altíð gera meir, men vit eru noydd at raðfesta orkuna, vit hava til øll málsøkini, sum vit hava ábyrgdina av, sigur Heðin Thomsen, sum leggur afturat, at í framtíðini kunnu fólk rokna við, at Fyribyrgingarráðið verður meiri sjónligt.

## Fyrimyndin

Tann besta fyribyrgingin er tann heildarkenda upplýsingin børn og ung fáa í skúlunum, hjá heilsusystrunum og hjá barnalandslæknanum, sum verður settur, sigur Heðin Thomsen.

- Lærarar og heilsusystrar gera eitt stórt arbeiði, tá ið tað kemur til fyribyrging og upplýsingar um heilsuna. Persónliga kundi eg hugsað mær, at ávirkanin á børnini í skúlunum gjørdist eitt natúrligt lið í dagligu undirvísingini, soleiðis at tey læra um ymsar vandar líka natúrligt sum um støddfrøði og landalæru. Verður tað gjørt, skal lestararætlanin fyri fólkaskúlan endurskoðast og hetta hava vit umrøtt í Fyribyrgingarráðnum.

Eitt er, hvat skúlin kann og eigur at gera. Annað er, hvat foreldur læra síni børn.

- Foreldur eiga eisini at vita, hvussu tey skulu læra børn síni um ymsu vandarnar, sum eru, sigur Heðin Thomsen.

At taka Rúsdrekka- og Narkotikaráðið av og ístaðin seta á stovn Fyribyrgingarráðið er gjørt fyri at hava alla fyribyrging í Føroyum undir einum. Málsøkini eru nógv og ymisk, eitt nú royking, rúsdrekka, rúsevni, eyðkvæmi og annað. Ein uppgáva hjá ráðnum er at gera tilmæli til landsstýrismannin við heilsumálum. Erna S. Hákonardóttir førdi fram í blaðnum í farnu viku, at tað er átrokandi neyðugt, at ein viðgerðarstovnur fyri ungar rúsevnismisnýtarar verður settur á stovn beinanvegin. Hesi ungu tørva eina serliga viðgerð, og hana kann eingin av verandi viðgerðarstovnum veita nóg góða, heldur hon. Heðin Thomsen er ikki samdur.

- Eg eri ikki vitandi um, at viðgerðarstovnarnir og psykiatriska deild ikki duga at viðgera ungar rúsevnismisnýtarar.

Í Fyribyrgingarráðnum sita umframt Heðin Thomsen, Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari í Mentamálastýrinum, Bjarta Wilhelm, leiðandi heilsusystir, Kjartan Mohr, farmaceutur, Magnus á Stongunum, kommunulækni, og Eyðvør Mortensen, deildarleiðari á Almannastovuni.


